ÚT AT KOYRA

## Toyota Prius



Heiðurslønirnar regna oman yvir Toyota Prius, heimsins fyrsta seriuframleidda hybridbil. Svenska blaðið “Trafik Magasinet” valdi herfyri Prius til ársins bil.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Renault 12 ára garanti



Nú allir Renault bilarnir fáa 100 prosent galvaniserað karossarí, veita teir 12 ára rustverjugaranti frá 1.mars 2001.

*Kelda: Volvo Personvogne DK A/S*

## Oldsmobile gevast



GM hava gjørt av, at Oldsmobile, ið er elsta bilmerkið í USA og næstelsta í heiminum, skal gevast, so hvørt núverandi modell ganga út. Hetta kemur sera óvart á hjá bilhandlarunum og kundunum.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Týskur spiónmyndatakari – allan heimin sum sítt arbeiðspláss

**Ongar bilverksmiðjur í heiminum kunnu kenna seg tryggar, tá týski spiónmyndatakarin, Hans G. Lehmann, við telelinsu síni avdúkar teirra loyndardómar. Arbeiði hansara umfatar øll heimsins lond, og kann skifta frá 40 kuldastigum til 40 hitastig**







*Bilverksmiðjurnar gera alt fyri at snýta spiónmyndatakararnar. Í USA tók Hans G.Lehmann hesa myndina av einum bili við Audi búmerkjum, og líktist einum A6. Í veruleikanum var hetta eitt topployndarmál hjá VW, tann nýggi stóri D2. Tað sum VW fekk burturúr at snýta Hans G.Lehmann, var at hann aðrastaðni frá fekk myndir, og her avdúkar hann hvussu bilurin kemur at síggja út*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Byrjaði í 1963

Alt byrjaði við, at Hans G. Lehmann í 1963 var og vitjaði foreldur síni í Wolfsburg. Har fekk hann eyga á ein bil, hann ikki hevði sæð áður. Hann tók myndir av bilinum og seldi tær til vikublaðið Stern. Tað vísti seg, at bilurin var ein VW type 97, sum eftir ætlan skuldi avloysa VW Bobluna. Hendan ætlanin hjá VW varð tó av ongum, men hetta varð byrjanin til yrkisleiðina hjá Hans G. Lehmann, ið bleiv heimsins mest kendi spiónmyndatakari.

### Altíð á staðnum

Áðrenn nýggir bilar koma alment fram, verða teir loyniliga royndarkoyrdir ymsastaðni í heiminum, fyri at vita um alt nú riggar sum tað skal undir teimum ymisku umstøðunum, ein bilur kann koma út fyri, heilt frá einum 40 hitastigum niður til 40 kuldastig. Bilarnir verða deilvís tildekkaðir, so ongin skal vita, hvat slag teir eru. Hans G. Lehmann hevur bæði eygu og oyru opin alla tíðina, fyri at vita hvat rørir seg á teimum ymsu bilverksmiðjunum. Sjálvt um alt verður hildið loyniligt, er Hans G. Lehmann á staðnum, tó uttan at nakar veit tað, fyri at avdúka eitt nýtt bilmerki við myndum og tí hann annars veit um bilin. Um tað so er í polarøkinum ella í einari oyðimørk, ella bilarnir koyra kamoufleraðir í einum býi einastaðni á knøttinum. Myndirnar verða síðan seldar til bilbløð, hann hevur avtalu við í fleiri londum. Í Danmark hevur FDM limablaðið, Motor, fyrsta rætt til myndirnar.

### Ikki uttan trupulleikar

Hóast hetta tykist at vera eitt spennandi arbeiði, er tað ikki altíð ein dansur á rósum. Fleiri ferðir hevur Hans G. Lehmann verið avdúkaður og komin út í stórar trupulleikar. Hann hevur sitið í fangahúsi í Algeria og Fraklandi fyri njósning, eisini hevur verið steinað eftir honum, og bilur hansara noyddur útav koyrivegnum. Politiið hevur eisini gjørt húsarannsóknir í heimi hansara og ákært hann fyri ídnaðarnjósning.

### VW til Grønlands

Tað er næstan ómøguligt hjá bilverksmiðjunum at halda nakað loyniligt fyri spiónmyndatakarum, bæði hvat viðvíkur myndum og øðrum upplýsingum. VW hevur tikið avgerð um at flyta sínar kuldatestir til Grønlands, har flogfør við testbilunum lenda og fara á flog á einum væl vardum privatum øki. Bert tíðin kemur at vísa, um tað fer at hjálpa.

*Kelda: FDM / Motor*



*Her er Hans G.Lehmann í 40 hitastigum í eini holu í Death Vally í USA. Hann hevur fingið eyga á bilin hann hevur bíða eftir, og kann selja myndirnar til tey bilbløð, hann hevur avtalu við, sum til dømis FDM limablaðið Motor*



*Tildekkaðan framman og aftan, hevur Hans G.Lehmann avmynda nýggjasta BMW-700, ið eftir ætlan verður á Frankfurt Motorshow í heyst, og kemur á marknaðin í 2002*



ÚT AT KOYRA

# Citroën Xsara – avgjørt kappingarførur í sínum klassa

**Við broyttari útsjónd, størri sporvídd, 15” hjólum og betri trygd, er Xsara við nýggja 1,6 bensinmotorinum og 110 hk ein sera kappingarførur bilur í sínum klassa. Leygardagin verður bilurin sýndur fram á bilasøluni hjá Ivan Johansen við Hoyvíksvegin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Tryggari enn áður

Í útsjónd er Xsara árgang 2001 mest broyttur framman, við nýggjum og størri forlyktum við klárum glasi og innbygdum tokulyktum, ið tilsamans geva 20 prosent betri ljós. Kølaragittari er vorðið ein partur av motorhjálminum, sum eisini er broyttur nakað. Tilsamans gevur hetta bilinum eina heilt aðra útsjónd, tá man møtir honum í ferðsluni.

Fyri at økja um trygdina í einum samanstoyti, hevur Xsara fingið styrkt karossarí, eins og hurðar og mittarstólpið eru stúttari. ABS og elektronisk deiling av bremsukraftini (EBD) eru nú standard, eins og skivubremsurnar aftan og framman eru munandi styrktar.

### Vælvirkandi motorur

Ístaðin fyri teir fyrru 1,6 og 1,8 litur motorarnar, hevur nýggi Xsara ein nýggjan 1,6 litur motor við 16 ventilum og 110 hestakreftum. Hetta er ein vælvirkandi motorur við góðari kraft og trekkjur eins væl við lágum og høgum motorsnúningum. Motorurin larmar lítið og lýkur øll Euro IV krøvini til dálking.




*Citroën Xsara árgang 2001 hevur nú størri lyktir framman við klárum glasi og innbygdum tokulyktum*

Annars fæst Xsara við fleiri motorstøddum, sum til dømis tí umhvørvisvinarliga 2,0 litur HDI dieselmotorinum.

### Nógv standardútgerð

Xsara er sera væl útgjørdur við nógvari standard útgerð, so sum ABS bremsur við EBD, variabla servostýring, tokulyktir aftan og framman, el-síðuspegl við varma, el-síðurútar, startsperru í lykilinum, ventilatiónskipan við pollenfiltur, varma í framsetrunum, sentrallás við fjarstýring og RDS radio við fløguspælara og 6 hátalarum.

### Framsýning leygardagin

Í sambandi við at teir fyrstu Xsara við nýggja motorinum komu til landið í vikuni, verður framsýning av bilunum á bilasøluni hjá Ivan Johansen leygardagin 3. februar frá kl. 10.00-14.00 har eisini verða møguleikar at royna aðrar nýggjar og brúktar bilar.








*Ístaðin fyri teir fyrru 1,6 og 1,8 litur motorarnar, hevur nýggi Xsara ein nýggjan 1,6 litur motor við 16 ventilum og 110 hestakreftum*

## Citroën Xsara 1.6 16V 5/ hurðum

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.6 litur 16V 110 hk |
| 0-100 km/t | 9.7 sek |
| Bensinnýtsla | 14.5 km/l |
| Dekkstødd | 195/55-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 419,0 cm |
| Breidd | 170,0 cm |
| Hædd | 141,0 cm |
| Eginvekt | 150 kg |
| Totalvekt | 1675kg |
| Viðførisrúm | 408 litar |
| Prísur | frá kr.149.900,- |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tlf: 313666 |